## Støkk-basarur



Støkk skipar fyri basari leygarkvøldið 8. nov. frá kl. 19 í fimleikarhøllini á Glyvrum. Í tíðindaskrivi verður sagt, at nógvir góðir lutir eru at vinna og lutaseðilin uppá bilin, ið er seldur ymsa staðni kring landið, verður trektur. Fleiri av valevnunum til kommunuvalið fara at snara hjólinum. Fimleikafelagið Støkk, sum júst hevur vunnið Fimleikafagnaðin 2008, hevur í fleiri ár arbeitt hart við at útvega pening til eina nýggja Støkk-høll, soleiðis at teir 600 íðkandi limirnir í felagnum fáa betri venjingarumstøður.

## Obama til Keypmannahavnar

Komandi vár hevur Altjóða Olympiska Nevndin, IOC ráðstevnu í Keypmannahavn. Á hesari ráðstevnu verður avgerð tikin um hvør býur skal verða vertsbýur til olympisku summarleikirnar í 2016. Millum býirnar, sum hava søkt um at gerast OL-vertsbýur, er heimbýurin hjá Barrack Obama, Chicago. Tí er ógvuliga sannlíkt, at Barrack Obama kemur til IOC-ráðstevnuna í Keypmannahavn komandi vár fyri at gera eitt lobbyarbeiðið fyri heimbýin. Hetta sigur samskiparin hjá danska ítróttarsambandinum, Morten Mølholm. Morten Mølholm undirstrikar, at táverandi bretski forsætisráðharrin, Tony Blair átti stóran part av æruni fyri, at Ongland í 2005 fekk vertsskapin fyri olympisku summarleikirnar í 2012.

# Toppurin hittist



**Tey fýra fremstu liðini skulu øll dystast innanhýsis um vikuskiftið, meðan Kyndil og KÍF skulu royna at ota seg uppeftir**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir eitt frívikuskiftið, har landsliðshondbóltur var á skránni, er nú aftur tíð hjá mansliðnum í hondbólti at dystast.

Og tað líkist nøkrum serstakliga spennandi uppgerðum hesaferð.

Størsti spenningurin er kanska í Hoyvíkarhøllini, har VÍF fer á vitjan. Vestmenningarnir hava higar til fulla úrtøku fyri sínar fýra dystir, og taka teir eisini stigini í Hoyvík, fer longu at síggja heilt gott út fyri teirra vónum um at røkka einum finalusessi. Hinvegin hava hoyvíkingar eisini víst sera góðar taktir – tó at tveir dystir eru taptir – og skulu teir hanga við í oddinum, so er neyðugt við einum sigri sunnudagin.

Og á Skála hittast FM-finalistarnir frá í vár, StÍF og Neistin. Samstundis er her talan um uppgerð millum liðini, sum renna beint aftan á vestmenningum, og tí eru tvey stig avgjørda málið hjá báðum pørtum.

Í Havn er botnuppgerð á skránni, tá Kyndil tekur móti KÍF. Kollfirðingar hava higar til verið púrasta sørir, meðan tað ikki hevur verið heilt so galið hjá Kyndli. Seinastu dystirnar hava eisini stórir batar verið í spælinum hjá Kyndli, og so er spurningurin, um teir nú veruliga kunnu kasta kappingarárið hjá sær ígongd.

*Hoyvíkingar hava sum mál at ota seg enn longur fram í ár. Spælið hevur verið á leið, men úrtøkan hevur ikki verið heilt nøktandi, og tí er kravið tvey stig, nú VÍF kemur á vitjan*

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 4 | 4 | - | 0 | 12 | 3 | 9 | 8 |
| 2 | Dráttur | 5 | 4 | - | 1 | 12 | 7 | 5 | 8 |
| 3 | Mjølnir | 5 | 3 | - | 2 | 10 | 7 | 3 | 6 |
| 4 | Fleyr | 5 | 3 | - | 2 | 10 | 8 | 2 | 6 |
| 5 | ÍF | 4 | 2 | - | 2 | 7 | 6 | 1 | 4 |
| 6 | KÍF | 6 | 1 | - | 5 | 9 | 15 | -6 | 2 |
| 7 | TB | 5 | 0 | - | 5 | 1 | 15 | -14 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fleyr | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 2 |
| 2 | SÍ | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 2 | 1 | 2 |
| 3 | ÍF | 1 | 0 | - | 1 | 2 | 3 | -1 | 0 |
| 4 | Mjølnir | 1 | 0 | - | 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |

### Fótbóltur

**Formula-deildin**
(endaliga støðan)

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | EB/S | 27 | 17 | - | 4 | - | 6 | 54 | 33 | 21 | 55 |
| 2 | HB | 27 | 14 | - | 7 | - | 6 | 57 | 22 | 35 | 49 |
| 3 | B36 | 27 | 14 | - | 6 | - | 7 | 34 | 25 | 9 | 48 |
| 4 | NSÍ | 27 | 14 | - | 5 | - | 8 | 41 | 33 | 8 | 47 |
| 5 | Víkingur | 27 | 12 | - | 6 | - | 9 | 43 | 33 | 10 | 42 |
| 6 | B68 | 27 | 11 | - | 3 | - | 13 | 24 | 38 | -14 | 36 |
| 7 | ÍF | 27 | 9 | - | 4 | - | 14 | 32 | 46 | -14 | 31 |
| 8 | KÍ | 27 | 7 | - | 7 | - | 13 | 31 | 39 | -8 | 28 |
| 9 | B71 | 27 | 6 | - | 5 | - | 16 | 26 | 47 | -21 | 23 |
| 10 | Skála | 27 | 4 | - | 7 | - | 16 | 22 | 48 | -26 | 19 |

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 106 | 77 | 29 | 8 |
| 2 | VB | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 110 | 93 | 17 | 6 |
| 3 | Tjaldur | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 92 | 83 | 9 | 5 |
| 4 | Neistin | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 94 | 94 | 0 | 3 |
| 5 | StÍF | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 88 | 110 | -22 | 2 |
| 6 | Kyndil | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 71 | 104 | -33 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 109 | 96 | 13 | 8 |
| 2 | Neistin | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 127 | 115 | 12 | 6 |
| 3 | StÍF | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 89 | 83 | 6 | 5 |
| 4 | H71 | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 113 | 100 | 13 | 4 |
| 5 | Kyndil | 4 | 0 | - | 1 | - | 3 | 89 | 113 | -24 | 1 |
| 6 | KÍF | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 91 | 111 | -20 | 0 |

## DYSTIR um vikuskiftið

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 09.11 | 14.30 | StÍF-Neistin |
| 09.11 | 15.00 | VB-Tjaldur |
| 09.11 | 16.00 | Stjørnan-Kyndil |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 09.11 | 16.00 | StÍF-Neistin |
| 09.11 | 16.00 | KÍF-Kyndil |
| 09.11 | 16.00 | H71-VÍF |

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 08.11 | 15.00 | SÍ-Dráttur |
| 08.11 | 16.00 | Fleyr-ÍF |
| 09.11 | 14.30 | TB-Mjølnir |

**Eik-ligan, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 08.11 | 14.00 | Fleyr-ÍF |
| 09.11 | 15.00 | Mjølnir-SÍ |